# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

**80 ár**
7. oktober verður Alfred Olsen, Vestmanna, 80 ár. Hann er burturstaddur á degnum.

**Brúdleyp**
Leygardagin 6. oktober kl. 15 giftast í Nøvling kirkju í Aalborg, Súsanna Sømark, Skálavík og Kim Christensen, Aalborg. Veitslan verður fyri innbodnum í felagshúsinum á Næssundvej 50.

**Føðingar**
19. september fingu Anita V. og Jónhallur Debes, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4500 gr.

23. sept. fingu Borghild og Martin á Fløghamri, Oyndarfjørður, eina dóttir. Hon var 54 cm. long og vigaði 3625 gr.

25. sept. fingu Jóhanna og Janus Thomsen, Toftir, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4050 gr.

25. sept. fingu Mariann Rubeksen og Zacharias Hansen, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3500 gr.

26. sept. fingu Eivin og Janet S. Gleðisheygg, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3200 gr.

27. sept. fingu Dinna Tindalíð og Eyðun Jaocbsen, Nes, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4700 gr.

28. sept. fingu Karina Arge Gregoriussen og Jákup Gøthe, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3700 gr.

29. sept. fingu Anna Maria og Carsten Zimakoff, Syðrugøta, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4150 gr.

30. sept. fingu Sigursól Jensen og Svenn Eysturtún Olsen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3320 gr.

1. oktober fingu Elin Kristina Gøthe og Petur Gaardlykke, Toftir, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3650 gr.

1. okt. fingu Sarah Khaliqhey og John Edvin Joensen, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3350 gr.

1. okt. fingu Marjun Johnsdóttir og Eli Eiriksson, Norðragøta, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4300 gr.

1. okt. fingu Sóleyð D. og Jens Albert Simonsen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3800 gr.

1. okt. fingu Rini og Sámal Sivertsen, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3675 gr.

2. okt. fingu Katrin og Bogi Jacobsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3500 gr.

3. okt. fingu Elisabeth Petersen og Jákup Lamhauge, Kollafjørður, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3700 gr.

3. okt. fingu Marin og Tonny Brimsvík, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 57 cm. long og vigaði 4000 gr.

4. okt. fingu Eydna og Jón Johannesen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3760 gr.

# Sløkkiliðsmenn 40 ára starvsdag



*Hilmar Johannesen (v.m.) og Anfinn Reinert hava verið 40 ár í starvi hjá Tórshavnar sløkkiliði*

*Mynd: Edvard Joensen*

Mánadagin 1. oktober 2007 høvdu tveir sløkkiliðsmenn hjá Tórshavnar sløkkiliði 40 ára starvsdag.

Tann 1. oktober 1967 byrjaðu Hilmar Johannesen og Anfinn Reinert í starvi hjá Tórshavnar sløkkiliði, og í hesum starvi eru teir framvegis. Dagurin 1. oktober er eisini stovningardagur hjá Tórshavnar sløkkiliði. Tað eru í ár liðin 74 ár, síðan Tórshavnar sløkkilið varð sett á stovn.

Á samkomu á Sløkkiliðsstøðini við Oyggjarvegin, handaði Kartni Jacobsen, sløkkiliðsstjóri, Hilmari og Anfinni heiðursbræv og heiðurstekin í gulli frá Beredsskabsstyrelsen sum viðurkenning fyri trúgva og góða tænastu.

Eisini Hans David Hansen, sum 1. mars hevði verið 20 ár í starvi hjá sløkkiliðnum, fekk heiðursbræv og heiðurstekin í silvuri frá Beredsskabsstyrelsen. Heðin Mortensen, borgarstjóri, helt eisini røðu og handaði gávur og blómur frá Tórshavnar kommunu.

*Kelda: www.torshavn.fo*

Lesið Sosialin - so eru tit við



Tann 31. august fingu Hervør og Kári á Torkilsheyggi ein son á Skejby sygehus. Hann var 55 cm langur, vigaði 3950 g, og eitur Jóel á Torkilsheyggi.



So eri eg her. Eg var føddur á Klaksvíkar Sjúkrahúsi hin 20-9-07 og fann skjótt út av at eg eri ein drongur og vigaði 3600 gr og var 54 cm langur, á myndini gevur Asbjørn stóri beiggi mær ein muss á pannuna. Míni foreldur eru Marjun Lómaklett og Janus á Tjaldrafløtti



29. september fingu Sonja og Finnur eina lítlasystur. Hon var 57 cm. long og vigaði 4600 gr. Foreldrini eru Kariann og Herleif Johannesen



20. september fingu Anna Sofía og Henrik Mellemgaard, Ballerup, ein son, sum eitur Theodor. Hann vigaði 4000 gr. og var 53 cm langur.